# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# KUNNU VÍSA VILJAN Í VERKI

Tað var skelkand at hoyra niðurstøðuna í kanningini um stakar uppihaldarar og børn teirra, sum tær báðar Annika Anthoniussen og Siri Hansen løgdu fram í Miðlahúsinum mikukvøldið: At 500 børn í Føroyum liva í fátækradømi – og um tær avleiðingarnar, sum hetta kann hava við sær, bæði sálarliga, kropsliga og sosialt.

Tað eru í øllum førum 1.000 stakir uppihaldarar í Føroyum, verður sagt. Sambært kanningini hjá teimum báðum verður roknað við, at í minsta lagi 500 børn liva í fátækradømi - ella tað sum verður nevnt »lutfalsligt fátækradømi«.

Í oddagreinini mikudagin numu vit við tað fyribrigdið, vit mangan hava í Føroyum, at vit heldur enn at sýna vilja til at loysa trupulleikar, so dylja vit trupulleika. Vit nokta bara blankt fyri, at trupulleikin er til. Tað at trupulleikin hjá støkum uppihaldarum ikki fær hægri raðfesting er uttan iva tí, at hetta eisini er ein javnstøðutrupulleiki - har tað sum oftast er kvinnan, sum er við sviðusoð – soleiðis at skilja, at tað sum oftast er kvinnan, sum stendur beinleiðis í trupulleikanum við børnunum.

Vit nevndu eisini hetta tríbýtið, vit hava millum tey ráðandi: Vit hava tey, sum nærmast kriminalisera stakar uppihaldarar og skíra tey at vera dovin, sum heilt sikkurt ikki eru veruliga støk. So hava vit tey, sum ikki vilja bøta um livikorini og hjálpina til stakar uppihaldarar, tí tað hevði eggjað fólki at farið hvør til sítt, og tað ber jú ikki til, tí hjúnarbandið skal varðveitast. Síðani hava vit seinasta bólkin við politikarum, sum ynskja at bøta um korini hjá støkum uppihaldarum - fyrst og fremst fyri at koma upp á støðið í Danmark, so vit ikki skulu missa hesar familjurnar útlands.

Kringvarpið setti eisini fokus á hetta málið í Eygsjón fríggjadagin, har tveir av hesum bólkunum oman fyri vóru umboðaðir, Bergtóra Høgnadóttir Joensen og Jógvan á Lakjuni. Tey livdu væl



upp til fordómarnar, tí tey vóru so rúkandi ósamd.

Tá tað kemur til stykkis, so sleppa politikararnir ikki undan at gera serskipanir til hendan samfelagsbólkin. Soleiðis verður gjørt aðrastaðni, og soleiðis mugu vit eisini gera. Vit kunnu ikki bjóða hesum stóra bólki, at tey verða landsforvíst.

Tosað hevur leingi verið um ein bústaðarpakka. Hesin hevur verið ávegis í fleiri ár og hjá fleiri landsstýrisfólkum. Vónandi verður hesin pakkin ein hjálp hjá hesum bólki – og løgting og landsstýri kunnu nú vísa í verki, um viljin er til staðar.

**» Tað er sum oftast kvinnan, sum er við sviðusoð**



The good samaritan

Gordhan Kanayalal Rajani, the first doctor of Indian origin in the history of the remote Danish colony near Iceland, who is stranded in Mumbai has turned personal misfortune into a blessing by alleviating pain and suffering in Mumbai

khalid@scope

khalid a-h ansari

Unable to return home in the Faroes Islands because of the chaos caused by volcano Eyjafjallajokull, Gordhan Kanayalal Rajani, the first doctor of Indian origin in the history of the remote Danish colony near Iceland, has turned personal misfortune into a blessing by alleviating pain and suffering in Mumbai.

The affable Rajani (GK to his legion of friends) had ... recently to Mumbai with his charming wife Gudrun for the ... brother.

# Rajani hjálpti í Mumbai

Læknin Gordhan Rajani, sum varð strandaður í India orsaka av øskurokinum úr Íslandi, hjálpti sjúkum fólki í Mumbai, meðan hann bíðað eftir flogfarti.

Tað skriva indiska heimasíðan Mid Day. Tað er Khalid A-H Ansari, sum skrivar um fyrrverandi yvirlæknan í føroyska sjúkrahúsverkinum í einari klummu.

Ansari skrivar, at 76 ára gamli Rajani var í næstsíðstu viku farin til India fyri at fylgja beiggja sínum til gravar. Føroyska kona hansara var eisini við á ferðini.

Tey strandaðu í India, tí flogferðslan til Europa gjørdist óreglulig orsaka av vulkanøskuni úr Íslandi.

Men meðan Rajani var staddur í Mumbai, brúkti hann tíðina til at hjálpa nøgvum sjúkum fólki ókeypis. Í Mid Day, har Rajani verður kallaður tann góði samariubúgvin, verður skrivað, at Rajani er sum ein leksikon, tá tað kemur til sjúkur og viðgerð av teimum.

Mid Day skrivar eisini søguna um Rajani, sum endaði sum lækni í Føroyum. Hann starvaðist annars í seks ár sum lækni í London, men har var hann so illa viðfarin, at hann rýmdi.

– Ein av mínum yvirmonnum viðfór meg sum ein hund, sigur Rajani sambært Mid Day.

Rajani sigur við blaðið, at hóast hann er errin av at verða indari, so er hann sera, sera errin av at verða føroyingur, og hann heldur, at føroyingar minna um indarar, tá ið tað kemur til familjulív.

Mid Day skrivar, at Rajani hevur javnan vitjað í Mumbai seinastu mongu árini, og at hann spælir golf, tá ið hann vitjar har.

*eydun@sosialurin.fo*



**» Familjan fyri størri ágangi enn nakrantíð**

JENIS AV RANA
KJAK Á SÍÐU 12



**» Gloym nýtt mentanarhús fyrstu árini**

STEINBJØRN O. JACOBSEN
KJAK Á SÍÐU 27

# Eyðun & Terji – nú við Susan K

Um vikuskiftið vitjaði danska reality-daman Susan K í Føroyum. Susan K gjørdist kend í sjónvarpsrøðini Paradise Hotel, og hevur síðani livað av at verða kend. Susan K var fríggjakvøldið og leygarkvøldið gestabarrvørður á Mica í Havn, sum helt eitt ára føðingardag. Umframt at skeinkja upp í gløs, royndi hon seg eisini sum sangara. Eyðun & Terji undirhildu í Mica, og teir spældu undir hjá Susan K. So kanska er ein nýggj trio fødd – í øllum førum fyri ta einu løtuna ta eina kvøldið.

# Liðformaðurin vil verja Gunnar

Higartil hevur Gunnar Nielsen bert ein lítlan hálvan tíma á baki sum málmaður í Premier League í Onglandi, men tað kann verða, at 23 ár gamli føroyski málmaðurin skal verja málið hjá Manchster City, nú avgerandi dystir standa fyri framman. Vanligi málmaðurin, Shay Given, spælir ikki aftur í hesum kappingarárinum.

Liðformaðurin hjá Manchester City sigur, at hann vil gera sítt fyri at hjálpa Gunnari.

– Vit sóu ein ungan málmann koma á vøllin og standa seg væl. Sum lið fara vit at verja Gunnar og hjálpa honum í teimum trimum dystunum, sum standa fyri framman, sigur Kolo Toure við blaðið Mirror.

– Gunnar arbeiðir hart, hann er altíð fokuseraður, hann er gløggur og ger nógvar góðar bjargingar í venjing, sigur Toure.

*eydun@sosialurin.fo*



Sosialurin

Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*